Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 13. apríl 2021
Mál nr.: 21/03208
Málsviðgjørt: SPS
Eftirkannað: 29. mars 2021

Uppskot til

Løgtingslóg
um
stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 fyri tíðarskeiðið frá og við 1. september 2020 til og við 30. apríl 2021

Nýtsluøkið

§ 1. Løgtingslógin fevnir um ferðavinnufyritøkur, sum í stuðulstíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 2, hava havt eina afturgongd í umsetninginum upp á í minsta lagi 40%.
Stk. 2. Ferðavinnufyritøkur eru fyritøkur, ið reka ferðavinnu sum høvuðsvirksemi á hesum virkisøkjum:
1) Gistingarhús.
2) Matstovur.
3) Ferðaskrivstovur.
4) Fyriskipaðar túrar.
5) Flutning av ferðafólki.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvørji gistingarhús, matstovur, ferðaskrivstovur, fyriskipaðir túrar og flutningsvirksemi koma undir stuðulsskipanina.
Stk. 4. Fylgjandi feløg, grunnar o.a. eru ikki fevnd av hesi løgtingslóg:
1) Stovnar innan fyri almennu fyrisitingina hjá landinum ella kommununum.
2) Vinnufeløg, grunnar o.a. hjá landi og kommunum, har landið ella kommunan eiga meirilutan ella velja meirilutan av nevndarlimunum.
3) Feløg, grunnar o.a. við almannagagnligum ella vælgerandi endamáli.

Stuðulsheimilaðar útreiðslur, stuðulstíðarskeið og tilvísingartíðarskeið

§ 2. Tað verður veittur stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur, undir hesum avskrivingar og lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk, sbr. eisini § 4, stk. 6.
Stk. 2. Stuðul verður veittur ferðavinnufyritøkum, sum í stuðulstíðarskeiðinum frá og við 1. september 2020 til og við 30. apríl 2021 í mun til eitt tilvísingartíðarskeið hava mist í minsta lagi 40% av umsetninginum, sbr. tó stk. 4.
Stk. 3. Tilvísingartíðarskeiðið er:
1) Frá og við 1. september 2018 til og við 30. apríl 2019, ella

2) fyri ferðavinnufyritøkur, sum eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, men áðrenn 12. mars 2020, og sum ikki hava ein umsetning í tíðarskeiðinum, nevnt í nr. 1, er tilvísingartíðarskeiðið frá og við 1. desember 2019 til og við 28. februar 2020.

Stk. 4. Hóast stk. 1 og 2 hava ferðavinnufyritøkur, sum eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, men áðrenn 12. mars 2020, og sum ikki kunna vátta greitt við tilvísing til eitt tilvísingartíðarskeið sambært stk. 3, at hava mist í minsta lagi 40% av umsetninginum, og sum orsakað av COVID-19 hava mist í minsta lagi 40% av væntaða umsetninginum, rætt til stuðul sambært hesi løgtingslóg.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvørjar upplýsingar skulu latast fyri at vátta mistan umsetning eftir 1. pkt.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um treytir, undir hesum umsetning, fastar útreiðslur, avskrivingar, lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk o.a.

Stuðulsupphædd

§ 3. Stuðul verður veittur fyri fastar útreiðslur við fylgjandi prosentstigi:

1) 75%, um afturgongdin í umsetninginum er 60-100%.
2) 50%, um afturgongdin í umsetninginum er 40-60%.

§ 4. Stuðulin eftir hesi løgtingslóg kann í stuðulstíðarskeiðinum í mesta lagi vera 10 mió. kr. til hvørja ferðavinnufyritøku.

Stk. 2. Er ferðavinnufyritøkan partur í einum samtaki, kann stuðulin í stuðulstíðarskeiðinum í mesta lagi vera 10 mió. kr. samlað fyri fyritøkurnar í samtakinum.

Stk. 3. Samtøk, fevnd av § 1, stk. 2, nr. 5, sum reka sjóvegis ferðafólkaflutning millum Føroyar og útheimin og samstundis hava virksemi, fevnt av § 1, stk. 2, nr. 1-4, kunnu fáa stuðul sum tvey sjálvstøðug samtøk sambært stk. 1.

Stk. 4. Stuðulin fyri fastar útreiðslur kann ikki verða størri enn áljóðandi nominella afturgongdin í umsetninginum hjá fyritøkuni frá tilvísingartíðarskeiðinum til stuðulstíðarskeiðið.

Stk. 5. Hevur fyritøkan fyri tíðarskeiðið 17. desember 2020 til 3. januar 2021 og ella fyri tíðarskeiðið 8. januar 2021 til 17. januar 2021 fingið stuðul eftir løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild hjá landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing) verður hesin stuðul mótroknaður í stuðli eftir hesi løgtingslóg.

Stk. 6. Lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk sambært § 2, stk. 1, skulu gerast upp sum partur av føstu útreiðslunum í stuðulstíðarskeiðinum, tó í mesta lagi fyri 10 starvsfólk í hvørjari fyritøku ella í hvørjum samtaki og í mesta lagi 27.000 kr. fyri hvørt starvsfólkið um mánaðin. Stk. 1, 2 og 3 verða nýtt samsvarandi.

Stk. 7. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samtøkur eftir stk. 2, mótrokning eftir stk. 5 og lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk eftir stk. 6.

§ 5. Um ferðavinnufyritøka ella samtak umframt ferðavinnuvirksemi, nevnt í § 1, stk. 2, eisini rekur annað virksemi, verður bert veittur stuðul fyri fastar útreiðslur viðvíkjandi teimum virkisøkjum, sum eru nevnd í § 1, stk. 2. Serstøk uppgerð skal gerast fyri umsetning og fastar útreiðslur, sum viðvíkja virkisøkinum ferðavinna.

Stk. 2. Hevur ferðavinnufyritøka ella samtak virksemi á tveimum ella fleiri virkisøkjum, nevnd í § 1, stk. 2, verða umsetningur og fastar útreiðslur gjørd upp fyri hvørt virkisøki sær, tó ikki um talan er um virkisøkið gistingarhús og matstovur á somu adressu.

Stk. 3. Fyri eina ferðavinnufyritøku, sum rekur tvey ella fleiri gistingarhús á tveimum ella fleiri adressum, verða umsetningur og fastar útreiðslur fyri tað ella tey gistingarhúsini, sum eru nýggj og ikki hava tilvísingarskeið, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, gjørd upp fyri

seg. Afturgongdin í umsetninginum fyri nýggja ella nýggju gistingarhúsini verður gjørd upp sum afturgongdin í mun til væntaðan umsetning í stuðulstíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 4.
Stk. 4. Hevur fyritøka, sum rekur gistingarhúsvirksemi, útbygt gistingarhúsið og økt munandi um gistingarmøguleikarnar, verða umsetningur og fastar útreiðslur fyri nýggja partin av gistingarhúsinum, sum ikki hevur verið tikin í nýtslu í einum tilvísingarskeiði, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, gjørd upp fyri seg. Afturgongdin í umsetninginum fyri nýggja partin av gistingarhúsinum verður gjørd upp sum afturgongdin í mun til væntaðan umsetning í stuðulstíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 4.
Stk. 5. Ásetingin í stk. 3 verður eisini nýtt upp á matstovuvirksemi.

Fylgitreytir

§ 6. Ferðavinnufyritøkan skal vátta:
1) At í inntøkuárunum 2021, 2022 og 2023 verður ikki rindað út vinningsbýti, ella útlutað til kapitaleigarar í sambandi við lækking av felagskapitalinum, og at egin partabrøv ikki verða keypt aftur í nevndu roknskaparárum, og
2) at fyritøkan rindar stuðulin aftur í tann mun, fyritøkan hevur havt skattligt yvirskot í roknskaparárinum 2021.

Stk. 2. Upphæddin, sum kann krevjast aftur eftir stk. 1, nr. 2, kann ikki vera størri enn yvirskotið.
Stk. 3. Fyritøkurnar kunnu sleppa undan treytunum í stk. 1, nr. 1 og 2, um tær rinda allan stuðulin aftur.

Umsóknir

§ 7. Umsókn um stuðul skal latast inn í seinasta lagi 1. juni 2021.
Stk. 2. Í umsóknini um stuðul skulu latast m.a. hesar upplýsingar:
1) Umsetningurin og føstu útreiðslurnar hjá fyritøkuni í stuðulstíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 2.
2) Umsetningurin hjá fyritøkuni í tilvísingartíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 3.

Stk. 3. Er stuðulsupphæddin til fyritøkuna omanfyri 120.000 kr., skal uppgerðin áteknast av góðkendum grannskoðara við váttan við grundaðari vissu. Tað kann eisini verða kravt í hvørjum føri sær, hóast 1. pkt., at uppgerðin skal áteknast av góðkendum grannskoðara við váttan við grundaðari vissu. Reglurnar í kunngerð um grannskoðaraváttanir o.a. eru galdandi fyri grannskoðaraváttanir eftir hesi áseting.
Stk. 4. Fyritøkan skal undir revsiábyrgd vátta við trú og heiður, at tær upplýsingar, sum fyritøkan hevur latið, eru rættar.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um upplýsingar, sum skulu latast í umsóknum um stuðul.

Eftirlit og afturrindan av stuðli

§ 8. Landsstýrismaðurin ella ein stuðulsmyndugleiki sambært § 9 hevur eftirlit við, at ásetingarnar í løgtingslógini ella ásetingar, sum eru settar sambært løgtingslógini, verða hildnar.
Stk. 2. Eru treytirnar í løgtingslógini ella í kunngerðum sambært hesi løgtingslóg ikki loknar, skal stuðulin heilt ella partvíst rindast aftur.
Stk. 3. Hevur ein ferðavinnufyritøka, ið fær stuðul, ikki hildið sína upplýsingarskyldu eftir ásetingunum í hesi løgtingslóg ella í ásetingum sambært løgtingslógini, ella móti betri vitan av órøttum fingið stuðul, skal fyritøkan ella búgvið hjá fyritøkuni gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.
Stk. 4. Ferðavinnufyritøkur og grannskoðarar hava skyldu at lata eftirlitsmyndugleikanum upplýsingar. Stuðulin kann verða kravdur aftur, um upplýsingar ikki verða latnar.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um eftirlit, undir hesum skyldur hjá ferðavinnufyritøkum og grannskoðarum at lata upplýsingar, og krav um afturrindan av stuðli, um upplýsingar ikki verða latnar, o.a.

Umsiting og kæra

§ 9. Landsstýrismaðurin kann eftir avtalu við viðkomandi landsstýrismann leggja stuðulsumsitingina til ein myndugleika undir avvarðandi landsstýrismanni.
Stk. 2. Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir løgtingslógini til myndugleika undir landsstýrismanninum ella til myndugleika, sum hoyrir undir annan landsstýrismann, kann hann áseta, at avgerðir, sum myndugleikin hevur tikið, ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Rættarvernd og innkrevjing

§ 10. Stuðulin kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hann er útgoldin. Avtala um transport er útgjaldaranum óviðkomandi.

§ 11. TAKS krevur ov nógv útgoldnan stuðul sambært hesi løgtingslóg inn.
Stk. 2. Rindar fyritøkan, sum hevur móttikið stuðul sambært hesi løgtingslóg, ikki rættstundis, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.
Stk. 3. Ov nógv útgoldin stuðul, ið er kravdur inn sambært stk. 1 og 2, og er fallin til gjaldingar, kann verða innheintaður við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.
Stk. 4. TAKS er eisini heimilað til at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Revsing

§ 12. Uttan so at størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður revsaður við sekt tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum.
Stk. 2. Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Gildiskoma

§ 13. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Stoyturin frá koronafarsóttini gjørdist ógvusligur fyri ferðavinnuna. Hóast ymiskt er, hvussu einstøku ferðavinnufyritøkurnar hava klárað seg gjøgnum kreppuna, so eru fleiri teirra undir stórum trýsti. Fara hesar av knóranum, ávirkar tað sannlíkt gongdina í føroysku ferðavinnuni fleiri ár fram í tíðina. Vandi er fyri, at fólk við serkunnleika leita sær í annað starv, og tungt kann verða at byggja líknandi fyritøkur uppaftur. Hetta kann gera, at partur av tí menning, sum væntast at taka seg upp aftur eftir at koronafarsóttin er hæsað av, blívur burtur.

Landið er enn bert partvís latið uppaftur, og enn er óvist í hvønn mun tað verður latið meira upp fyri ferðafólki í summar. Vandi er tí fyri, at virksemið hjá annars burðardyggum fyritøkum heldur uppat, orsakað av vantandi gjaldføri at rinda føstu útreiðslurnar, missa tær eitt summar afturat.

Landsstýrið hevur havt fundir við Ferðavinnufelagið og Vinnuhúsið, sum hava mælt til, at ein nýggjur hjálparpakki fyri ferðavinnufyritøkur verður settur í verk, og Búskaparráðið hevur í síni seinastu várfrágreiðing mælt til tað sama.

Landsstýrið metir, at tørvur er á einum nýggjum hjálparpakka til ferðavinnuna, og verður skotið upp at gera ein hjálparpakka 4 til ferðavinnuna eftir sama leisti sum hjálparpakka 3.

1.2. Galdandi lóggáva

Stuðul til ferðavinnufyritøkur er latin eftir løgtingslóg nr. 97 frá 23. juni 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (hereftir hjálparpakki 3), og kunngerð nr. 134 frá 28. august 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (hereftir kunngerðin um hjálparpakka 3).

Stuðul eftir hjálparpakka 3 kundi verða latin fyri fastar útreiðslur í stuðulstíðarskeiðinum 12. mars 2020 til 31. august 2020. Seinasta freist at søkja var 31. oktober 2020. Sostatt er ikki longur møguligt at fáa stuðul eftir hjálparpakka 3.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er, eins og endamálið við hjálparpakka 3, at veita ferðavinnufyritøkum stuðul, fyri at annars burðardyggar fyritøkur kunnu standa ímóti og koma ígjøgnum kreppuna soleiðis, at hendan vinnan ikki fer fyri bakka, men at fyritøkurnar kunnu vera til reiðar at halda fram við rakstrinum, tá latið verður meira upp fyri ferðandi, og vónandi við vaksandi virksemi í ferðavinnuni.

Føroyska ferðavinnan er vaksin nógv seinastu árini, og útlit eru til, at vøksturin kann halda fram. Fyri váðan í samlaða føroyska búskapinum er tað gagnligt, at ferðavinnan gerst ein størri partur av búskapinum. Harvið verður búskapargongdin í Føroyum ikki eins nógv tengd at tilfeingisvinnunum, sum hon er í løtuni. Gongst sum ætlað, so fer ferðavinnan at gerast ein nógv størri partur av samlaða føroyska búskapinum. Hetta eyka beinið undir føroyska búskapinum minkar um búskaparsveiggini, sum standast av upp- og niðurgongd í fiski- og alivinnuni.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skotið verður upp at seta í verk eina stuðulsskipan líknandi stuðulsskipanini eftir hjálparpakka 3.

Ásetingarnar í uppskotinum eru í stóran mun framhald av ásetingunum í hjálparpakka 3, tó við ávísum broytingum og nágreiningum, sbr. 1.4.3.3 og 1.4.3.6. niðanfyri.

Høvuðstættirnir í uppskotinum eru hesir:

1.4.1. Fyritøkur fevndar av uppskotinum

Fyri at koma undir stuðulsskipanina eftir uppskotinum, skulu ferðavinnufyritøkurnar í stuðulstíðarskeiðinum hava havt afturgongd í umsetninginum upp á í minsta lagi 40%.

Ferðavinnufyritøkurnar eru eftir uppskotinum gistingarhús, matstovur, ferðaskrivstovur, túrafyriskiparar og flutningur av ferðafólki. Stovnar innan fyri almennu fyrisitingina hjá landinum og kommununum, vinnufeløg, grunnar o.a. hjá landi og kommunum og feløg,

grunnar o.a. við almannagagnligum ella góðgerandi endamáli, eru ikki fevnd av uppskotinum.

AirBnB og privat útleigan, summarhús o.a. eru ikki fevnd av uppskotinum. Hesi kunnu í stóran mun umleggja til vanliga útleigan.

1.4.2. Stuðulsheimilaðar útreiðslur, stuðulstíðarskeið og tilvísingartíðarskeið
Stuðulsheimilaðar útreiðslur eftir uppskotinum eru fastar útreiðslur, undir hesum avskrivingar og lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk.

Stuðul verður veittur til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur, sum í stuðulstíðarskeiðinum í mun til eitt tilvísingartíðarskeið, hava mist í minsta lagi 40% av umsetninginum. Fastar útreiðslur eru eisini avskrivingar, og stuðul verður latin til lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk.

Stuðulstíðarskeiðið er frá 1. september 2020 til 30. apríl 2021.

Tilvísingartíðarskeiðið er frá og við 1. september 2018 til og við 30. apríl 2019. Fyri ferðavinnufyritøkur, sum eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, men áðrenn 12. mars 2020, og sum ikki hava ein umsetning í tíðarskeiðinum, nevnt frammanfyri, er tilvísingartíðarskeiðið frá og við 1. desember 2019 til og við 28. februar 2020.

Stuðul verður tó eisini veittur til nýggjar fyritøkur, sum ikki hava havt inntøkur í einum tilvísingarskeiði, og verður grundarlagið væntaða afturgongdin í umsetninginum í stuðulstíðarskeiðinum.

1.4.3. Stuðulsupphæddir
Stuðul verður veittur við 75% av føstu útreiðslunum í stuðulstíðarskeiðinum, um afturgongdin í umsetninginum er 60-100%, og við 50%, um afturgongdin í umsetninginum er 40-60%.

1.4.3.1. Hægsta mark fyri stuðli
Skotið verður upp, at stuðulin kann í mesta lagi vera 10 mió. kr. til hvørja ferðavinnufyritøku. Er ferðavinnufyritøkan partur í einum samtaki, kann stuðulin í stuðulstíðarskeiðinum í mesta lagi vera 10 mió. kr. samlað fyri fyritøkurnar í samtakinum.

Samtøk, sum reka sjóvegis ferðafólkaflutning millum Føroyar og útheimin og samstundis hava annað ferðavinnuvirksemi, kunnu fáa stuðul sum tvey sjálvstøðug samtøk.

1.4.3.2. Mótrokning
Fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing var í § 18 a, stk. 1 og 3 í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 12. desember 2020, heimilað landsstýrismanninum fyribils og í avmarkað tíðarskeið við kunngerð at avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar hjá matstovum og skeingingarstøðum. Ásett varð í § 18 a, stk. 3, at gjørdi landsstýrismaðurin av at avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevði matstovan ella skeinkingarstaðið rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Heimildin varð sett inn í lógina við løgtingslóg nr. 165 frá 12. desember 2020, sum hevði sólsetursáseting um, at lógin fór úr gildi 1. februar 2021.

Við nevndu lógarheimild vórðu tvær kunngerðir settar í gildi.

Onnur kunngerðin var kunngerð nr. 176 frá 16. desember 2020 um avmarkaðar upplatingartíðir fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing. Eftir hesi kunngerð vórðu matstovur og skeinkingarstøð áløgd at steingja í seinasta lagi kl. 22:00 í tíðarskeiðinum 17. desember 2020 til 3. januar 2021. Matstovur og skeinkingarstøð, ið vóru áløgd at steingja, høvdu rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Stuðul varð veittur fyri tíðarskeiðið 17. desember 2020 til 3. januar 2021.

Hin kunngerðin var kunngerð nr. 1 frá 7. januar 2021 um avmarkaðar upplatingartíðir í tíðarskeiðinum 8. januar til 17. januar 2021 fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing. Eftir hesi kunngerð vórðu matstovur og skeinkingarstøð áløgd at steingja í seinasta lagi kl. 22:00 í tíðarskeiðinum 8. januar 2021 til 17. januar 2021. Matstovur og skeinkingarstøð, ið vórðu áløgd at steingja, høvdu rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Stuðul varð veittur fyri tíðarskeiðið 8. januar 2021 til 17. januar 2021.

Nakrar fyritøkur hava fingið útgoldið stuðul til at rinda fastar útreiðslur í nevndu tíðarskeiðum, tilsamans góða 1 mió. kr. Hesi tíðarskeið eru partvíst samanfallandi við stuðulstíðarskeiðið eftir uppskotinum. Tær fyritøkur, sum hava fingið stuðul í hesum tíðarskeiðunum, skulu tí mótroknast.

1.4.3.3. Lønarútreiðslur

Tað verður veittur stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur, undir hesum lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk. Lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk skulu gerast upp sum partur av føstu útreiðslunum í stuðulstíðarskeiðinum, tó í mesta lagi fyri 10 starvsfólk í hvørjari fyritøku ella í hvørjum samtaki og í mesta lagi 27.000 kr. fyri hvørt starvsfólkið um mánaðin. Ásetingarnar um hægsta mark fyri stuðli verða eisini nýttar upp á lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk.

Eftir hjálparpakka 3 kundi vera ivi um, hvussu markið upp á 27.000 kr. fyri hvørji 10 starvsfólk um mánaðin skuldi fatast.

Skuldi tað fatast soleiðis, at hvør fyritøka fekk útgoldið 75% ella 50% av føstu útreiðslunum umframt 27.000 kr. í stuðli fyri hvørji 10 starvsfólk, t.d. fastar útreiðslur kr. 500.000 x 75% = 375.000 + 270.000 ella 645.000 kr. í stuðli? Ella skuldi tað fatast soleiðis, at lønarútreiðslurnar skuldu takast upp í útrokningargrundarlagið fyri fastar útreiðslur, t.v.s. at um fyritøkan t.d. hevði fastar útreiðslur upp á 500.000 umframt 270.000 til kjarnustarvsfólk, so skuldu latast 770.000 x 75% ella 577.500 kr. í stuðli?

Eftir uppskotinum er markið upp á 27.000 kr. eitt mark fyri, hvussu stóra upphædd til lønarútreiðslur fyritøkurnar kunnu taka við í útrokningargrundarlagið. Hetta er ein nágreining í mun til reglurnar í løgtingslógini um hjálparpakka 3 og í samsvari við praksis eftir tí hjálparpakkanum.

1.4.3.4. Ferðavinnuvirksemi og annað virksemi í sama felag ella somu fyritøku

Um fyritøka ella samtak umframt ferðavinnuvirksemi eisini rekur virksemi á øðrum virkisøkjum, verður bert veittur stuðul fyri fastar útreiðslur í sambandi við ferðavinnuvirksemið. Hetta er ein nágreining í mun til hjálparpakka 3, og í samsvari við kunngerðina um hjálparpakka 3.

1.4.3.5. Ymiskt ferðavinnuvirksemi í sama felag ella somu samtøku
Hevur ein fyritøka ella samtak ymiskt ferðavinnuvirksemi, sum kemur undir lógina, t.d. gistingarhúsvirksemi og matstovuvirksemi, kann fyritøkan fáa stuðul fyri hvørt virkisøki sær, tó ikki um talan er um virkisøkið gistingarhús og matstovur á somu adressu. Hægsta mark fyri stuðlinum upp á 10 mió. kr. er tó galdandi fyri samlaða virksemið. Hetta er ein nágreining í mun til hjálparpakka 3, og í samsvari við kunngerðina um hjálparpakka 3.

1.4.3.6. Nýggj gistingarhús og útbygging av verandi gistingarhúsum
Skotið verður upp í § 5, stk. 3 í uppskotinum, at ein fyritøka, sum rekur tvey ella fleiri gistingarhús, kann fáa stuðul fyri hvørt gistingarhús sær í førum, har eitt av gistingarhúsunum er nýtt og ikki hevur havt nakað virksemi í tilvísingartíðarskeiðunum, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 og 2 í uppskotinum. Somu reglur verða at nýta upp á matstovuvirksemi. Hetta er nýtt í mun til hjálparpakka 3.

Eisini í hesum førum er hægsta mark fyri stuðlinum upp á 10 mió. kr. galdandi fyri samlaða virksemið.

Orsøkin til hesa áseting er, at nógv ferðavinnufeløg øktu munandi um sítt virksemi í tíðini upp undir farsóttina. Hjálparpakki 3 tók hædd fyri, at nýggjar ferðavinnufyritøkur vórðu settar á stovn, ella at feløg fóru undir nýtt ferðavinnuvirksemi. Nýggjar ferðavinnufyritøkur kundu nýta eitt styttri tilvísingartíðarskeið, sum tók hædd fyri, at fyritøkurnar vóru farnar undir rakstur stutta tíð áðrenn farsóttina. Fyritøkur, sum vóru farnar undir virksemi beint áðrenn farsóttina, og tí ikki høvdu eitt umboðandi tilvísingartíðarskeið, kundu gera eina meting av væntaða umsetninginum, og á tann hátt gera eina meting av niðurgongdini í umsetningi. Á sama hátt kundu feløg, sum vóru farin undir nýtt ferðavinnuvirksemi afturat sínum verandi virksemi (t.d. eitt gistingarhús, sum fór undir nýtt virksemi við ferðafólkaflutningi), eisini gera serstaka uppgerð fyri hetta nýggja virksemið við eini meting av væntaða umsetninginum.

Tað hava tó víst seg at finnast føri, har farið er undir nýtt virksemi á einum verandi virkisøki. Dømi eru um, at feløg, sum reka gistingarhús, hava bygt nýtt gistingarhús. Sum hjálparpakki 3 varð orðaður, skulu hesi gistingarhúsini roknast saman, tá mett verður um stuðulin.

Dømi 1 – nýtt hotell:
Felag 1 rekur eitt gistingarhús áðrenn farsóttina. Beint áðrenn farsóttina er felagið liðugt at byggja eitt nýtt gistingarhús, ið fer í rakstur. Tá felagið fór undir bygging varð roknað við, at nýggja gistingarhúsið fór at umseta fyri umleið helvtina av tí gamla gistingarhúsinum. Tá farsóttin rakar, er stórt fall í umsetninginum í gamla gistingarhúsinum, og sera lítil umsetningur er í tí nýggja í mun til væntanirnar. Av tí at umsetningurin hjá gamla og nýggja gistingarhúsinum skal roknast saman sambært hjálparpakka 3, sær uppgerðin hjá felagnum soleiðis út:

Felag 1	Umsetningur			Stuðul
	Áðrenn	Eftir	Fall í umsetningi	
Gamla gistingarhúsið	100	40	60%	n.a.
Nýggja gistingarhúsið	0	21	n.a.	n.a.
Tilsamans	**100**	**61**	**39%**	**0%**

Felag 1 fær í hesum føri ikki stuðul, tí at eingin staðfestur umsetningur var í nýggja gistingarhúsinum áðrenn, og tann lítli umsetningurin, sum kemur í nýggja gisitingarhúsinum eftir, lyftir felagið upp um niðara markið fyri at móttaka stuðul (í minsta lagi 40 % niðurgongd í umsetningi).

Hjálparpakki 4 rættar upp á hendan skeivleika við at loyva felagnum at gera upp nýggja gistingarhúsið eftir sama leisti, sum var talan um eitt nýtt virkisøki:

Felag 1	Umsetningur			Stuðul
	Áðrenn	Eftir	Fall í umsetningi	
Gamla gistingarhúsið	100	40	60%	50%
Nýggja gisitingarhúsið	*50**	21	42%	50%

** Meting av væntaða umsetninginum*

Felagið fær í hesum førinum 50% stuðul til føstu útreiðslurnar í ávikavist gamla og nýggja gistingarhúsinum.

Munandi kapasitetsøking
Hjálparpakki 3 legði heldur ikki upp fyri, at summi gistingarhús øktu munandi um sín kapasitet við at útbyggja talið av seingjarplássum.

Skotið verður tí upp, at eisini tey føri, har ein kapasitetsøking fer fram við at eitt verandi gistingarhús verður útbygt, sum hevur við sær munandi kapasitetsøking, skulu verða javnsett við føri, tá nýtt gistingarhús hjá somu fyritøku ella samtaki verður bygt á aðrari adressu.

Skotið verður upp, at hevur fyritøka, sum rekur gistingarhúsvirksemi, útbygt gistingarhúsið og økt munandi um gistingarmøguleikarnar, verða umsetningur og fastar útreiðslur fyri nýggja partin av gistingarhúsinum, sum ikki hevur verið tikin í nýtslu í einum tilvísingarskeiði, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, gjørd upp fyri seg. Afturgongdin í umsetninginum fyri nýggja partin av gistingarhúsinum verður gjørd upp sum afturgongdin í mun til væntaðan umsetning í stuðulstíðarskeiðinum, sbr. § 2, stk. 4.

Við orðingina at hava økt munandi um gistingarmøguleikarnar skilst, at fyritøkan ella samtakið hevur økt talið á seingjarplássum við í minsta lagi 50%.

Dømi 2 – munandi kapasitetsøking:

Felag 2 rekur eitt gistingarhús áðrenn farsóttina. Beint áðrenn farsóttina er felagið liðugt við eina munandi útbygging, sum økir kapasitetin frá 100 seingjarplássum til 150 seingjarpláss. Tá farið varð undir útbyggingina, varð roknað við, at gisitingarhúsið við nýggju seingjarplássunum fór at umseta fyri umleið helvtina meira. Tá farsóttin rakar, er stórt fall í umsetninginum, men útbyggingin hevur økt um kapasitetin, og tí er fallið í umsetninginum ikki eins stórt.

Sambært hjálparpakka 3 sær uppgerðin hjá felagnum soleiðis út:

Felag 2	Umsetningur			Stuðul
	Áðrenn	Eftir	Fall í umsetningi	
Gistingarhús	100	61	39%	0%

Felagið fær í hesum førinum ongan stuðul til føstu útreiðslurnar hjá hotellinum.

Hjálparpakki 4 rættar upp á hetta við at loyva felagnum at gera upp nýbyggingina eftir sama leisti, sum var talan um eitt nýtt virkisøki:

Felag 2	Umsetningur			Stuðul
	Áðrenn	Eftir	Fall í umsetningi	
Gistingarhús	100	40,6	59,6%	50%
Nýggj seingjarpláss	*50**	20,3	40,6%	50%

* *Meting av væntaða umsetninginum*

Umsetningurin verður í hesum førinum býttur í mun til lutfallið av seingjarplássum, sum útbygging gav eyka, t.e. í hesum førinum 1/3 til nýggju seingjarplássini og 2/3 til gomlu seingjarplássini. Hetta lutfallið verður somuleiðis nýtt, tá stuðul skal rindast og føstu útreiðslurnar skulu býtast millum vanliga virksemið og kapasitetsøkingina.

1.4.4. Fylgitreytir

Eftir hjálparpakka 3 skuldi setast sum fylgitreyt fyri at fáa stuðulin útgoldnan, at ferðavinnufyritøkan váttaði, at tað í inntøkuárunum 2020, 2021 og 2022 ikki varð rindað út vinningsbýti o.a., og at fyritøkan rindaði stuðulin aftur í tann mun, fyritøkan hevði havt skattligt yvirskot í roknskaparárinum 2020. Hesar fylgitreytir eru endurtiknar í hesum uppskotinum.

Avmarking á stjóraløn var í hjálparpakka 2 (smærri fyritøkur), men ikki í hjálparpakka 3 og tí heldur ikki í hesum uppskotinum.

1.4.5. Umsóknir

Umsóknir um stuðul skulu latast inn í seinasta lagi 1. juni 2021.

1.4.6. Kunngerðarheimild

Nærri reglur um stuðulsskipanina verða ásettar í kunngerð, líknandi reglunum í kunngerðini um stuðul eftir hjálparpakka 3.

1.4.8. Umsiting
Ætlanin er at leggja umsitingina av lógini til TAKS.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið varð tann 26. mars 2021 sent til ummælis hjá Ferðavinnufelagnum, Vinnuhúsinum og Felagnum fyri Ferðaleiðarar við svarfreist 6. apríl 2021.

Ferðavinnufelagið lat inn ummæli, og er ummælið frá felagnum lagt við sum fylgiskjal 1.

Ferðavinnufelagið tók sum heild undir við uppskotinum, men mælti til fylgjandi broytingar í uppskotinum:

1. Um gistingarhús nýliga er útbygt, verða umsetningur og fastar útreiðslur gjørd upp fyri seg fyri nýggja partin av gistingarhúsinum.
2. At hægsta stuðulsupphæddin verður 14 mió. kr. í staðin fyri 10 mió. kr., sum var hægsta stuðulsupphædd eftir hjálparpakka 3.
3. At stuðulin, sum ávísar fyritøkur hava fingið í vetur vegna afturlating av teirra virksemi, ikki verður mótroknaður í hjálparpakka 4
4. At útreiðslur til grannskoðara í sambandi við umsókn til hjálparpakka 4 og harumframt til grandskoðaraváttanina verða endurrindaðar, um umsóknin verður gingin á møti.

Viðmerkingar:

Til nr. 1
Uppskotið er broytt aftan á hoyringina. Víst verður til § 5, stk. 4 í uppskotinum og viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 1.4.3.6.

Til nr. 2
Ferðavinnufelagið mælir í sínum ummæli til, at hægsta stuðulsupphædd eigur at vera 14 mió. kr., sum er samsvarandi einum átta mánaða tíðarskeiði.

Mett verður, at markið upp á 10 mió. kr. er rímiligt og nøktandi.

Endamálið við stuðlinum er, eins og endamálið við hjálparpakka 3, at veita ferðavinnufyritøkum stuðul, fyri at annars burðardyggar fyritøkur kunnu standa ímóti og koma ígjøgnum kreppuna soleiðis, at hendan vinnan ikki fer fyri bakka, men at fyritøkurnar kunnu vera til reiðar at halda fram við rakstrinum, tá latið verður meira upp fyri ferðandi.

Hvør fyritøka ella hvørt samtak kann í mesta lagi fáa 10 mió. kr. í stuðli. Tað er bert ein ella tvær stórar, sterkar og vælriknar fyritøkur ella samtøk, sum møguliga raka hetta markið. Nú útlit eru til, at samfelagið verður opnað meira aftur eiga hesar fyritøkur við einum stuðli upp til 10 mió. kr. at fara at standa seg og vera til reiðar at økja virksemið aftur, tá samfelagið verður opnað meira aftur.

Til nr. 3.
Nakrar fyritøkur hava fingið útgoldið stuðul til at rinda fastar útreiðslur í tíðarskeiðinum 17. desember 2020 til 3. januar 2021 og í tíðarskeiðinum 8. januar 2021 til 17. januar 2021,

tilsamans kr. 1.032.522. Hesi tíðarskeið eru partvíst samanfallandi við stuðulstíðarskeiðið eftir uppskotinum. Tær fyritøkur, sum hava fingið stuðul í hesum tíðarskeiðunum, skulu tí mótroknast. Tað er rímiligt, tí annars verða tær yvirkompenseraðar (dupultkompenseraðar).

Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 1.4.3.2.

Til nr. 4.
Ferðvinnufelagið viðmerkir, at "*Ein onnur broyting í uppskotinum er, at uppgerðin skal áteknast av góðkendum grannskoðara, um stuðulsupphæddin er omanfyri 120.000 kr.*

Hetta er ikki ein broyting. Reglurnar í § 7 í uppskotinum um grannskoðaraváttanir eru tær somu sum í kunngerðini um hjálparpakka 3.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Sambært hjálparpakka 3 varð stuðul latin til fastar útreiðslur fyri 5 ½ mánað, og samlað varð útgoldin stuðul fyri umleið 22 mió. kr. Sambært uppskotinum verður stuðul veittur fyri fastar útreiðslur í 8 mánaðir. Umroknað fer hetta longda stuðulstíðarskeiðið at kosta landskassanum 32 mió. kr. Men av tí at 10 mió. kr. í hjálparpakka 3 vórðu latnar til Gist & Vist, sum enn eru á hámarkinum, er tillagaða kostnaðarmetingin 27,5 mió. kr. Summi ferðavinnufeløg hava óivað tillagað virksemið og hava tí møguliga lækkað útreiðslurnar (t.d. starvsfólkakostnað, leigu v.m.). Um so er, kostar hetta uppskotið nakað minni.

Týðandi er tó at viðmerkja, at hvørki Norrøna ella hotellini hjá Smyril Line søktu um stuðul úr hjálparpakka 3. Søkja og fáa hesi feløg úr hjálparpakka 4, verður pakkin sannlíkt ávikavist 10 ella 20 mió. kr. dýrari. Hetta merkir, at stuðulin til ferðavinnuna samlað kann fara at kosta millum 27,5 mió. kr. og 47,5 mió. kr.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Ætlanin er at leggja umsitingina av skipanini til TAKS, sum skal móttaka, viðgera og taka avgerð í málum um umsókn um stuðul. Tað fer sannlíkt at krevja, at nøkur starvsfólk í eitt avmarkað tíðarskeið burturav røkja hesar uppgávur.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri ferðavinnuna. Raksturin hjá fyritøkunum verður styrktur. Fyritøkurnar fáa umsitingarligar uppgávur í sambandi við umsóknir um stuðul.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið inniheldur ásetingar um revsing.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki skatta- ella avgjaldsáleggingar.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur at lata rættar upplýsingar í sambandi við umsóknir um stuðul.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin og heimilar landsstýrismanninum eftir avtalu við viðkomandi landsstýrismann at leggja umsitingina av skipanini til stovn hjá avvarðandi landsstýrismanni.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í Jamun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Ásetingin í § 1 í uppskotinum er framhald av ásetingini í § 1 í løgtingslóg nr. 97 frá 23. juni 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (hereftir hjálparpakki 3), og snýr seg um, hvørjar ferðavinnufyritøkur eru fevndar av uppskotinum.

Tað fylgir av § 1, stk. 1 í uppskotinum, at orsakað av serligu støðuni hjá ferðavinnuni í sambandi við koronakreppuna, er stuðulsskipanin, eins og eftir hjálparpakka 3, ætlað ferðavinnufyritøkum.

Fyri at koma undir stuðulsskipanina eftir uppskotinum, skal talan vera um munandi afturgongd í umsetninginum í stuðulstíðarskeiðinum í minsta lagi upp á 40%.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvørji gistingarhús, matstovur, ferðaskrivstovur, fyriskipaðir túrar og flutningsvirksemi koma undir stuðulsskipanina. Ætlanin er at áseta líknandi reglur sum tær, ið eru ásettar í § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 134 frá 28. august 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19

Uppskotið fevnir um ferðavinnufyritøkur. Sostatt fevnir uppskotið ikki um stovnar innan fyri almennu fyrisitingina hjá landinum ella kommununum, og feløg, grunnar o.a. við almannagagnligum ella vælgerandi endamáli. Stuðulsskipanin eftir uppskotinum er ætlað privatu vinnuni, og vinnufeløg, grunnar o.a. hjá landi og kommunum, har landið ella kommunan eiga meirilutan ella velja meirilutan av nevndarlimunum, undir hesum dótturfeløg hjá nevndu feløgum og grunnum, eru tí ikki fevnd av uppskotinum.

Eftir § 1, stk. 2 í uppskotinum eru nevndar tær vinnugreinar innan ferðavinnu, sum eru fevndar av uppskotinum. Skotið verður upp, at stuðulsskipanin skal fevna um gistingarhús, matstovur, ferðaskrivstovur, fyriskiparar av túrum og fyritøkur, ið flyta ferðafólk.

Til § 2

Ásetingin í § 2 í uppskotinum er framhald av ásetingini í løgtingslógini um hjálparpakka 3.

Ásetingin snýr seg um stuðulsheimilaðar útreiðslur, stuðulstíðarskeið og tilvísingarskeið.

Skotið verður upp, at stuðul kann verða veittur til at rinda fyri fastar útreiðslur.

Nærri reglur um fastar útreiðslur verða ásettar í kunngerð. Í kunngerðini um stuðul til ferðavinnufyritøkur eftir hjálparpakka 3, eru fastar útreiðslur allýstar soleiðis:

"Fastar útreiðslur eru skjalfestar útreiðslur viðvíkjandi virkseminum hjá fyritøkuni, knýttar at virksemi í Føroyum, sum eru óheftar av søluni og framleiðsluni hjá fyritøkuni, og sum fyritøkan skal rinda, hóast fyritøkan ikki hevur sølu ella framleiðslu eitt tíðarskeið, undir hesum húsaleiga, el, leasing, tryggingargjøld, fjarskiftisgjøld og hiti umframt rentuútreiðslur o.a. Avskrivingar eru fastar útreiðslur umframt lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk."

Ætlanin er í kunngerðini at áseta líknandi reglur um fastar útreiðslur.

Stuðul kann eftir uppskotinum verða veittur til at rinda fyri fastar útreiðslur í einum stuðulstíðarskeiði.

Stuðulstíðarskeiðið er tað tíðarskeiðið, har tað verður veittur stuðul fyri føstu útreiðslurnar hjá fyritøkuni. Stuðulstíðarskeiðið er 1. september 2020 til og við 30. apríl 2021.

Tað er ein treyt, at fyritøkan í stuðulstíðarskeiðinum kann skjalprógva at hava havt afturgongd í umsetninginum samanborið við umsetningin í einum tilvísingartíðarskeiði. Tilvísingartíðarskeiðið skal umboða vanligar umstøður, samanborið við óvanligu umstøðurnar, sum standast av korona í stuðulstíðarskeiðinum.

Stuðulstíðarskeiðið er 1. september 2020 til og við 30. apríl 2021. Undir vanligum umstøðum hevði eitt umboðandi tilvísingartíðarskeið tí verið 1. september 2019 til 30. apríl 2020, men í stórum parti av tí tíðarskeiðinum var samfelagið latið aftur orsakað av korona, og hava ferðavinnufyritøkurnar mist umsetning av somu orsøk. Hetta tíðarskeiðið er tí ikki umboðandi.

Skotið verður tí upp, at tilvísingartíðarskeiðið er frá og við 1. september 2018 til og við 30. apríl 2019. Fyri ferðavinnufyritøkur, sum eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, men áðrenn 12. mars 2020, og sum ikki hava ein umsetning í tíðarskeiðinum, nevnt frammanfyri, er tilvísingartíðarskeiðið frá og við 1. desember 2019 til og við 28. februar 2020. Í seinna førinum skal útrokningin av afturgongd í umsetningi roknast soleiðis, at tilvísingartíðarskeiðið verður býtt við 3 og faldað við 8.

Nýstovnaðar fyritøkur hava einki samanberingargrundarlag at skjalprógva afturgongd í umsetninginum samanborið við eitt tilvísingartíðarskeið. Við atliti at endamálinum við stuðlinum verður mett, at hesar fyritøkurnar, eins og eftir hjálparpakka 3, eiga at verða stuðlaðar. Í staðin fyri eitt tilvísingartíðarskeið, verður grundarlagið fyri afturgongd í umsetningi væntaða umsetningstapið í stuðulstíðarskeiðinum. Nýstovnaðar fyritøkur eftir uppskotinum eru fyritøkur, sum eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, men áðrenn 12. mars 2020, og sum ikki kunna vátta greitt við tilvísing til eitt tilvísingartíðarskeið at hava mist í minsta lagi 40% av umsetninginum.

Til §§ 3 og 4
Ásetingarnar viðgera støddá stuðulsupphæddum og eru framhald av reglunum í §§ 3 og 4 í løgtingslógini um hjálparpakka 3, tó verður hægsta stuðulsupphædd eftir uppskotinum 10 mió. kr.

Stuðulin eftir uppskotinum er stigvísur. Stuðulin er 75% av føstu útreiðslunum í stuðulstíðarskeiðinum, um afturgongdin í umsetninginum hevur verið 60-100%, og 50%, um afturgongdin í umsetninginum hevur verið 40-60%.

Føstu útreiðslurnar hjá ferðavinnufyritøkunum skulu fyrst og fremst rindast av umsetninginum og inntøkunum hjá ferðavinnufyritøkunum, og stuðulin skal ikki hava við sær, at fyritøkurnar verða yvirkompenseraðar. Stuðulsupphæddin skal tí ikki vera størri enn nominella afturgongdin í umsetninginum.

Stuðulin kann í stuðulstíðarskeiðinum í mesta lagi vera 10 mió. kr. til hvørja ferðavinnufyritøku. Er ferðavinnufyritøkan partur í einum samtaki, kann stuðulin í stuðulstíðarskeiðinum í mesta lagi vera 10 mió. kr. samlað fyri fyritøkurnar í samtakinum.

Samtøk, sum reka sjóvegis ferðafólkaflutning millum Føroyar og útheimin og samstundis reka annað ferðavinnuvirksemi, kunnu fáa stuðul sum tvey sjálvstøðug samtøk.

Hevur fyritøkan fyri tíðarskeiðið 17. desember 2020 til 3. januar 2021 og ella fyri tíðarskeiðið 8. januar 2021 til 17. januar 2021 fingið stuðul eftir løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19) verður hesin stuðul mótroknaður í stuðli eftir uppskotinum. Víst verður til almennu viðmerkingarnar undir pkt. 1.4.3.2.

Stuðul til lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk kann í mesta lagi vera fyri 10 starvsfólk í hvørjari fyritøku ella samtaki og í mesta lagi 27.000 kr. fyri hvørt starvsfólkið um mánaðin. Eftir uppskotinum er markið upp á 27.000 kr. eitt mark fyri, hvussu stóra upphædd til lønarútreiðslur fyritøkurnar kunnu taka við í útrokningargrundarlagið. Hetta er ein nágreining í mun til reglurnar og í samsvari við praksis eftir hjálparpakka 3, sbr. almennu viðmerkingarnar undir pkt. 1.4.3.3.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samtøkur mótrokning eftir stk. 5 og lønarútreiðslur til kjarnustarvsfólk eftir stk. 6..a. Ætlanin er at áseta líknandi reglur sum í kunngerðini um stuðul eftir kunngerð nr. 134 frá 28. august 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19, sum allýsir samtøkur sum eitt móðurfelag og dótturfeløg tess, sbr. § 5, nr. 17 og § 7 í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg.

Til § 5
Ásetingin viðger spurningin nærri um uppgerðina av umsetningi og føstum útreiðslum í førum, tá ferðavinnuvirksemi og annað virksemi, sum ikki er ferðavinnuvirksemi, er í somu fyritøku ella samtøku. Eisini regulerar ásetingin spurningin nærri um uppgerðina av umsetningi og føstum útreiðslum í førum, tá ymiskt ferðavinnuvirksemi verður rikið í sama felag ella somu samtøku.

Um ferðafyritøka ella samtak umframt ferðavinnuvirksemi eisini rekur virksemi á øðrum virkisøkjum, verður bert veittur stuðul fyri fastar útreiðslur í sambandi við ferðavinnuvirksemið. Hetta er ein nágreining í mun til hjálparpakka 3, og í samsvari við kunngerðina um hjálparpakka 3.

Hevur ein fyritøka ella samtak ymiskt ferðavinnuvirksemi, sum kemur undir lógina, t.d. gistingarhúsvirksemi og matstovuvirksemi, kann fyritøkan fáa stuðul fyri hvørt virkisøki sær, tó ikki um talan er um virkisøkið gistingarhús og matstovur á somu adressu. Hægsta mark fyri stuðlinum upp á 10 mió. kr. er tó galdandi fyri samlaða virksemið. Hetta er ein nágreining í mun til hjálparpakka 3, og í samsvari við kunngerðina um hjálparpakka 3.

Harumframt regulerar ásetingin nærri uppgerðina av føstum útreiðslum og umsetningi í førum, tá gistingarhúsvirksemi hjá somu fyritøku ella samtøku verður víðkað við nýggjum gistingarhúsi, og í førum tá verandi gistingarhús verða munandi útbygd við nýggjum gistingarmøguleikum.

Skotið verður upp í § 5, stk. 3 í uppskotinum, at ein fyritøka, sum rekur tvey ella fleiri gistingarhús, kann fáa stuðul fyri hvørt gistingarhús sær í førum, har eitt av gistingarhúsunum er nýtt og ikki hevur havt nakað virksemi í tilvísingartíðarskeiðunum, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 og 2 í uppskotinum. Somu reglur verða at nýta upp á matstovuvirksemi. Hetta er nýtt í mun til hjálparpakka 3. Eisini í hesum førum er hægsta mark fyri stuðlinum upp á 10 mió. kr. galdandi fyri samlaða virksemið.

Skotið verður tí upp, at eisini tey føri, har ein kapasitetsøking fer fram við at eitt verandi gistingarhús verður útbygt, sum hevur við sær munandi kapasitetsøking, skulu verða javnsett við føri, tá nýtt gistingarhús hjá somu fyritøku ella samtaki verður bygd á aðrari adressu.

Til § 6
Uppskotið til ásetingina í § 6 inniheldur reglur um, hvørjar fylgitreytir skulu setast fyri at rinda stuðulin út.

Ásetingin er framhald av § 5 í løgtingslógini um stuðul til ferðavinnufyritøkur eftir hjálparpakka 3.

Mett verður, at ferðavinnufyritøkur, sum fáa stuðul, ikki samstundis eiga at kunna rinda vinningsbýti ella á annan hátt útluta til eigararnar, og at fyritøkur, sum hava yvirskot í 2021, eisini sjálvar eru førar fyri at rinda føstu útreiðslurnar í stuðulstíðarskeiðinum í tann mun, tær hava havt yvirskot í 2021.

Eftir uppskotinum skal ferðavinnufyritøkan vátta, at í inntøkuárunum 2021, 2022 og 2023 verður ikki rindað út vinningsbýti ella útlutað til kapitaleigarar í sambandi við lækking av felagskapitalinum, og at egin partabrøv ikki verða keypt aftur í nevndu inntøkuárum. Hendan áseting merkir t.d., at um eitt dótturfelag í eini samtøku móttekur stuðul, so kann hetta dótturfelag ikki gjalda vinningsbýti o.a. til móðurfelagið. Móðurfelagið, ið ikki beinleiðis hevur móttikið stuðul, kann tó í hesum føri gjalda vinningsbýti o.a. til kapitaleigararnar.

Eisini skal ferðavinnufyritøkan vátta, at fyritøkan rindar stuðulin aftur í tann mun, fyritøkan hevur havt skattligt yvirskot í roknskaparárinum 2021. Hetta er galdandi fyri móttakandi felagið, sbr. viðmerkingarnar omanfyri um vinningsbýti o.a. Upphæddin, sum kann krevjast aftur, kann ikki vera størri enn yvirskotið.

Fyritøkurnar kunnu sleppa undan treytunum, um tær rinda allan stuðulin aftur.

Til § 7
Ásetingin í uppskotinum inniheldur reglur um upplýsingar, sum skulu latast í umsókn um stuðul, og um freist at lata inn umsókn umframt heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um umsóknir. Umsókn um stuðul skal latast inn í seinasta lagi 1. juni 2021.

Ásetingin er framhald av § 6 í løgtingslógini um hjálparpakka 3. Harumframt eru ásetingarnar í § 8 í kunngerð um stuðul eftir kunngerð nr. 134 frá 28. august 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19, um grannskoðaraváttanir og váttanir frá fyritøkuni um, at tær upplýsingar, sum fyritøkan hevur latið, eru rættar, tiknar við í hetta uppskotið.

Í umsóknini um stuðul skulu latast m.a. upplýsingar um umsetning og fastar útreiðslur hjá fyritøkuni í stuðulstíðarskeiðinum og upplýsingar um umsetning hjá fyritøkuni í tilvísingartíðarskeiðinum.

Tað er avgerandi, at upplýsingar, sum verða latnar stuðulsumsitingini, eru rættar og fullfíggjaðar. Ásett er tí, at ferðavinnufyritøkan undir revsiábyrgd skal vátta við trú og heiður, at tær upplýsingar, sum fyritøkan hevur latið, eru rættar.

Skotið verður upp, at er stuðulsupphæddin til fyritøkuna omanfyri 120.000 kr., skal uppgerðin áteknast av góðkendum grannskoðara við váttan við grundaðari vissu. Tað kann eisini verða kravt í hvørjum føri sær, hóast stuðulsupphæddin til fyritøkuna ikki er omanfyri 120.000 kr., at uppgerðin skal áteknast av góðkendum grannskoðara við váttan við grundaðari vissu. Reglurnar í kunngerð um grannskoðaraváttanir o.a. eru galdandi fyri grannskoðaraváttanir eftir hesi áseting.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um upplýsingar, sum skulu latast í umsóknum um stuðul, líknandi teimum í kunngerðini um stuðul eftir hjálparpakka 3.

Í § 12 í uppskotinum er ásett revsiábyrgd fyri tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum.

Til § 8
Ásetingin inniheldur reglur um eftirlit við stuðulsskipanini, og er framhald av § 7 í løgtingslógini um hjálparpakka 3.

Tað er umráðandi, at tað er álit á, at stuðulin verður rindaður út samsvarandi endamálinum við skipanini, og at váðin fyri misbrúki verður minst møguligur.

Í uppskotinum verður tí ásett, at eftirlit skal vera við stuðulsskipanini. Eftir uppskotinum verður eftirlitið í byrjanarstøðu lagt til landsstýrismannin, sum eftir avtalu við avvarðandi landsstýrismann kann leggja tað til stovn undir avvarðandi landsstýrismanni. Eftirlitið við stuðulsskipanini eftir hjálparpakka 3 varð lagt til TAKS, og er ætlanin, at eisini eftirlitið við stuðulsskipanini eftir hesum uppskotinum verður lagt til TAKS, sum eisini annars skal vera stuðulsumsiting.

Ásetingin í uppskotinum snýr seg um eftirlit við, at ásetingarnar í løgtingslógini og ásetingar, sum eru settar sambært løgtingslógini, verða hildnar. Eru treytirnar í løgtingslógini ella í

kunngerðum sambært hesi løgtingslóg ikki loknar, skal stuðulin heilt ella partvíst rindast aftur.

Hevur ein ferðavinnufyritøka, ið fær stuðul, ikki hildið sína upplýsingarskyldu eftir ásetingunum í hesi løgtingslóg ella í ásetingum sambært løgtingslógini, ella móti betri vitan av órøttum fingið stuðul, skal fyritøkan ella búgvið hjá fyritøkuni gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

Ferðavinnufyritøkur og grannskoðarar hava skyldu at lata eftirlitsmyndugleikanum upplýsingar. Stuðulin kann verða kravdur aftur, um upplýsingar ikki verða latnar.

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um eftirlit, undir hesum skyldur hjá ferðavinnufyritøkum og grannskoðarum at lata upplýsingar, og krav um afturrindan av stuðli, um upplýsingar ikki verða latnar, o.a.

Til § 9
Ásetingin er framhald av § 8 í løgtingslógini um hjálaparpakka 3.

Skotið verður upp, landsstýrismaðurin eftir avtalu við viðkomandi landsstýrismann leggur stuðulsumsitingina til ein myndugleika undir avvarðandi landsstýrismanni.

TAKS hevur røttu førleikarnar og skipanir at umsita stuðulsskipanir sum hesa, og umsitingin av stuðulsskipanini eftir hjálparpakka 3 varð løgd til TAKS. Ætlanin er, at eisini hendan stuðulsskipanin verður løgd til TAKS. Tað krevst serlig lógarheimild at skerja kærumøguleikan til landsstýrismannin eisini í førum, tá myndugleiki verður delegeraður tvørtur um stjórnarráð. Tað hevur stóran týdning, at umsóknir um stuðul kunnu verða skjótt avgreiddar og rindaðar fyritøkunum.

Sostatt verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta, at avgerðir, sum viðkomandi stuðulsmyndugleiki hevur tikið eftir løgtingslógini ella reglum, sum eru settar sambært løgtingslógini, ikki kunnu kærast til landsstýrismannin.

Til § 10
Ásetingin er framhald av § 9 í løgtingslógini um hjálparpakka 3.

Skotið verður upp, at stuðulin kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hann er útgoldin. Avtala um transport er útgjaldaranum óviðkomandi.

Til § 11
Ásetingin er framhald av § 10 í løgtingslógini um hjálparpakka 3.

Skotið verður upp, at TAKS krevur ov nógv útgoldnan stuðul eftir hesi løgtingslóg inn. Eisini verður skotið upp, at rindar fyritøkan, sum hevur móttikið stuðul, ikki rættstundis, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Ov nógv útgoldin stuðul, ið er kravdur inn, og er fallin til gjaldingar, kann verða innheintaður við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum. Eftir uppskotinum verður TAKS heimilað at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Samsvarandi áseting er í § 8 í stuðulslógini um hjálparpakka 3.

Til § 12
Ásetingin er framhald av § 11 í løgtingslógini um hjálparpakka 3.

Skotið verður upp, at uttan so at størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður revsaður við sekt tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum. Tað kann verða álagt løgfrøðiligum persónum revsiábyrgd eftir kapitli 5 í revsilógini.

Til § 13
Eftir uppskotinum kemur løgtingslógin í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin kann seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð.

Sambært § 6, stk. 1, nr. 1 kunnu fyritøkur, ið móttaka stuðul sambært lógini, ikki rinda út vinningsbýti o.a. til og við roknskaparárið 2023. Tískil skal TAKS hava eftirlit við hesum fyritøkum í hvussu er til seinnu hálvu 2024 og møguliga longur. Av hesi orsøk er torført at gera eina neyva áseting um nær lógin kann fara úr gildi, og tí er vald ein loysn, sum loyvir landsstýrismanninum at seta lógina úr gildi, tá ið TAKS boðar frá, at tey nú gevast við at hava eftirlit við fyritøkum, sum hava fingið stuðul sambært lógini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 13. apríl 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Fylgiskjal 1: Ummælisskriv frá Ferðavinnufelagnum